07 VESTUR

**07 Vestur**
**Postrúm 51**
**Postrúm 370**
**Miðvági**

**STOVNAÐ**
**6. november 2007**

**FORMAÐUR**
**Eivin Jacobsen**

**MEISTARAR**
**Ongantíð (Besta úrslit nr. 1 í 1. deild í 2008)**

**STEYPAVINNARAR**
**Ongantíð**

**GREIPUVINNARAR**
**Ongantíð**

**Í BESTU DEILDINI**
**(1 ár)**
**2009**

**Í Europa**
**Ongantíð**




# Vágamenn trívast væl har vesturi

**Í nýggjari roynd at vinna sær fótafesti í fremstu fótbóltsrøðini hava vágamenn fingið kend fremmand fótbóltsnøvn vestur at hjálpa til**

Um tað hesa ferð fer at eydnast hjá vágamonnum at halda tørn um plássið í bestu deildini, fer tíðin at vísa. Setningurin er í fyrstu atløgu at sleppa undan niðurflytingini, og tað halda teir har vesturi, at tað eru góðir møguleikar fyri. Undirtøkan fyri felagnum er góð í allari oynni.

Síðani 07 Vestur sá dagsins ljós, hava heimadystirnir verið spældir í Sørvági, sum hevur víst seg at vera sannur skansi. Í fjør vórðu allir fjúrtan landskappingardystirnir vunnir, og í steypakappingini spældu teir javnt bæði ímóti Víkingi og B36. Í fyrra førinum vunnu vágamenn brotssparkskappingina, og í seinna førinum taptu teir.

Venjarin hevur í tjúgu ár verið í fremstu røð í føroyskum fótbólti. Piotr Krakowski kom til Føroya sum fínur miðvallarspælari, og fyri nett tjúgu árum síðani var hann við til at tryggja sandoyingum fyrsta og higartil einasta FM heitið. Nú er Piotr kanska tann royndasti av øllum teimum, sum eru við til at mynda føroyska fótbóltstindin. Aftrat sær hevur Piotr Hegga Samuelsen, ið hevur spælt nógv við liðunum í Vágum.

Flestu royndirnar hevur Tór-Ingar Akselsen, superveteranurin Jens Erik Rasmussen, málverjin Trygvi Askham, Kim Poulsen og Ingi Ole-Jacobsen.

Millum aðrar í besta fótbóltsaldur, men sum enn ikki hava havt møguleika at fótað sær í bestu deildini, eru Hans Arni Ellefsen, Ragnar Niclassen, Gunnar Haraldsen, Jógvan Holm, Jóan Petur á Stongum og Sjúrður Ellefsen og so eru tað ungir spælarar sum eitt nú Holgar Djurhuus, Andrá Johansen og 16 ára gomlu Rógvi F. Nielsen og Eli F. Nielsen.

Tveir ungir HB spælarar, Hendrik Rubeksen og Torkil Kollsker, royna eydnuna í Vágum, og so er tað útlendska íslettið, sum er týdningarmikið, nú roynt verður at fáa teir lokalu at fóta: álopsspælarin Ike og miðvallarin Milan Pejcic, sum báðir hava verið í NSÍ og brasiliumaðurin Ricardo, sum nú skal royna seg í 07 Vestur álopinum. Royndirnar at fáa brasilkar fótbóltsspælarar at blóma á føroyskum graslíki og í føroyska veðrinum hava ikki altíð verið so hepnar. Um tað hepnast væl við Ricardo, so verður hann verdugur avloysari fyri pólverjan Andrzej Stretowicz, sum seinasta árini hevur verið eyðsýndur málrevur, hóast hann hevur verið skaðaplágaður.

Vágamenn trívast væl har vesturi. Nú fæst at síggja, um tað hesa ferð eydnast vágaliðnum at finna stevið í fremstu røð!

## Hópurin hjá 07 VESTUR:

**MÀLVERJAR:**
Trygvi Askham
Birgir Joensen

**VERJA:**
Hans Arni Ellefsen
Torkil Kollsker (Áður spælt við HB)
Rógvi E. Nielsen
Gunnar Haraldsen
Ragnar Niklassen

**MIÐVØLLUR:**
Ingi O Jacobsen
Jóan P á Stongun
Milan Pejcic (NSÍ)
Sjúrður Ellefsen
Jógvan Holm
Eli F Nielsen
Holgar Djurhuus
Ricardo Da Braga
Tór-Ingar Akselsen (HB)

**ÁLOP:**
Jens E Rasmussen (HB, TB, Leiftur, B36)
Kim Poulsen
Hendrik Rubeksen (HB, B68, GÍ, AB)
André Johansen

**TILGONGD:**
Torkil Kollsker, HB
Milan Pejcic, NSÍ
Hendrik Rubeksen, HB

**FRÁGONGD:**
Andrzej Stretowicz, Pólland
Jovan Radomir Panic, Serbia
Silva da Braga, givin
Jón Nielsen, HB

**VENJARI:**
Piotr Krakowski

**HJÁLPARVENJARI:**
Jógvan Hendrik S. Samuelsen